TING-HELLAN

# Menningarlæran - ein trúarspurningur?

UPPRUNI
Richard Schwartson



*'We who cherish science should be careful to distinguish when we are doing science and when we are extrapolating from it, particularly when we are teaching our students.If it is science, that is to be taught, then teach science and nothing more. Leave the other discussions for a more appropriate time.'*
*(Vit sum hava vísindina kæra eiga at vísa varsemi, at vit skilja millum nær vit arbeiða innan vísindaliga økið, og nær vit ekstrapolera út um vísindaliga økið, serliga tá ið vit undirvísa næmingum okkara. Er tað vísind sum skal lærast, lær so vísind, og onki annað. Lat hinar spurningarnar hvíla til eitt meiri hóskandi høvi.)*
Michael Ruse

*'To go from a bacterium to people is less of a step than to go from a mixture of amino acids to a bacterium.'*
Lynn Margulis

## Vísindaligar arbeiðshættir

Endamálið við náttúruvísindi er á rationella hátt at granska og greina tað sum er. Við øðrum orðum, so er náttúruvísundi ein leitan eftir at skilja náttúruna, og at finna høpi og samanhang í fysiska heiminum. Onkur heldur kanska, at óneyðugt var við eini slíkari lýsing, tí soleiðis arbeiðir vísindin. Og kortini er vísindaligu arbeiðshættirnir ikki so óheftir, sum vit ofta hugsa. Kendi setningurin, at vit 'hava brillurnar aftanfyri eyguni' er eisini galdandi, tá eygleiða fysiska heimin. Vit gera okkara eygleiðingar frá einum framman undan valdum sjónarhorni, Við einum øðrum kendum setningi, hesaferð frá guðfrøðini, so er eisini innan vísindi galdandi, at 'vit mugu trúgva fyri at skilja'. Sjálvandi eigur ein slík trúgv at verða opin fyri broytingum, í ljósinum av seinni kanningarúrslitum. Tí er vísindi eitt rationelt virksissøki. Men vísindi er eisini eitt persónligt virkisøki, soleiðis sum enski vísindaspekingurin Michael Polanyi sigur í bókini Personal Knowledge, at vísindaligar eygleiðingar, metingar og niðurstøður verða gjørdar av fólki, sum eru lærd upp í vísindaligum arbeiðshættum, men kortini í stóran mun grundaðar á royndir hjá viðkomandi, og á tað sum viðkomandi 'kennir á sær' er tað rætta (intuition).

Tá ið empiriskar eygleiðingar og granskingarúrslit verða tulkaði út frá náturaliskiskum fortreytum, so verða niðurstøðurnar natúralistiskar. Hóast ein av stuðulsfólkunum hjá menningarlæruni, so sigur amerikanski professarin Michael Ruse kortini soleiðis: 'tað tykist sum at menningarlæran hjá mongum mest av øllum minnir um eina sekulera (verðsliga) religión, og at menningarlæran sum eitt vísindaligt ástøði er vorðin natúralistisk á ein slíkan hátt, at hon vísir frá sær alt tað sum líkist undurverkum ella tílíkum.'



*Frá DNA til aminosýru*

## Dawkins og replikatorar

Enski Cambridge-professarin í Quantum Physics, Dr. John Polkinghorne, sigur í bók síni 'Belief in God in an Age of Science', at eins og tað var í post-Newtonsku ættarliðnum, har alt í ovfarakæti skuldi greinast mekanistiskt - eisini menniskjað - soleiðis roynir okkara ættarlið av lívfrøðingum at greina allar lívfrøðiligar gongdir og livandi verur sum framkomin genetisk tól, før fyri at nørast og liva víðari við framkomnum ílegum (genum). Oxford professarin Richard Dawkins er millum ídnastu talsmenn fyri hesi áskoðan. Hann er faðir at replikatorástøðinum. Sambart Dawkins, so hava ílegurnar íbornar eginleikar at verja seg sjálvar, og hava eitt íborið aðalendamál - at yvirliva.



Soleiðis málber Dawkins seg í bókini 'The Selfish Gene' viðvíkjandi replikatorum, at teir 'perhaps discovered how to protect themselves' (teir duga kanska at verja seg sjálvar) og at teir 'built survival machines for themselves to live in' (teir gera haldgóðar maskinur, sum teir kunnu yvirliva í og ígjøgnum). Løgið at Dawkins, sum er reduktionistur um ein háls, brúkar slíkar endamálsorðingar fyri replikatorarnar. Hugspekingurin Mary Midgley sigur eitt sindur skemtandi um orð Dawkins: 'Gen kunnu ikki verða sjálvsøkin ('selfish') ella ósjálvsøkin, líka lítið sum atom kunnu verða øvundsjúk, elefantar abstraktir ella skipskeks teleologiskar.'

*'The undreamt-og breakthrough of molecular biology has made the problem of the origin of life a greater riddle than it was before: we have aquired new and deeper problems.'*
- Karl R. Popper

Kanadiumaðurin og arvagranskarin Richard Lewontin sigur í bókini 'Biology as Ideology: The Doctrine of DNA', at áskoðanir sum tær hjá Richard Dawkins og øðrum reduktionistum geva ílegunum 'ein nútímans farra av náði'. Høvuðsboðskapurin hjá Lewontin er, at áskoðanin um at ílegan er tann molekyleri heilin aftanfyri alt livandi, er vísindaliga og hugmyndaliga burturvið. Í summum lærubókum í lívfrøði verður ført fram, at ílegurnar eru tey 'vitugu' lívsmolekylini, ið eru før fyri at gera eggjahvítaevni, og avrit av sær sjálvum. Slík hugsan áleggur ílegunum eginleikar, sum Lewontin rópar 'a mysterious, autonomous power, that seems to place them above the more ordinary materials of the body' (eina dulda, sjálvstýrandi kraft, sum setur tær omanfyri hinar partar í kroppinum).

Vísindaliga vita vit, at ílegur gera ikki nakað av sær sjálvum, og tær taka heldur ikki avrit av sær sjálvum sum tað fellur teimum best. Fyri at eitt eggjahvítaevni skal verða framleitt í eini livandi veru, skulu nógvar samansettar gongdir samskipast í ymsum pørtum í kyknuni, soleiðis at tann informatiónin, sum liggur goymd í DNA streinginum í tí ávísu íleguni kann verða brúkt til at framleiða eitt ávíst eggjahvítaevni.

At leggja meiri týdning í ílegurnar enn tað sum er vísindaliga prógvað, er við orðum Michael Ruse, 'at extrapolera út um vísindaliga økið.'

*'We emerge inevitably or by luck luck from the chipping of DNA by cosmic rays, chemical currents in the space, the bubbling of volcanic mud.' -*
Dennis Overbye

Líknilsi um telduhvølpin
Lat okkum íklæða dagsins paradigmi um upprunan til lívið (paradigmi: tær 'brillurnar' ella 'hugsunarbygningur', sum samfelagið sær heimin ígjøgnum. Eitt paradigmi-skifti fer fram, tá samfelagið sær heimin gjøgnum aðrar 'brillur') í eitt líknilsi frá telduheiminum.

## Upprunin til telduhvølpin:

Leivdir frá steinrenningum (fossilum) benda á, at lummahvølpar við 240 kilobytes av goymsluminni - prokariotiskar kyknur - vóru til, longu tá jørðin kølnaði.

Serligar og lagaligar umstøður gjørdu tað møguligt, at silikonflísar við streymrásum vórðu til (einfaldar ílegur). Hiti, møguliga orsaka av radioaktiviteti ella eldgosum ella av meteorum, sum raktu jørðina, fekk silikonið at bráðna, soleiðis at silikonflísarnar vórðu myndaðar. Tilvildarligar skvettir frá bráðnaðum steinsløgum raktu silikonflísarnar, og harvið gjørdust streymrásir á silikonflísunum. Snarljós góvu streym til tann fyrsta prototelduhvølpin, og onkursvegna hevði hann fingið 25 bytes av forritum í telduminnið (40-100 nukleotidir), sum gjørdu, at hann hevði eina ávísa nyttu. Battaríir (sum loyvdu sjálvstøðugari evnisbroyting) komu seinni. Tey fyrstu battaríini vóru jarn/sýrubattaríir, sum vórðu til í runuhyljum. Litiumbattaríini mentust nógv seinni.

Í dag hava vit bert ábendingar um telduhvølpar, sum eru mentir til ta støðið, sum vit hava teir í dag, við ymsum roknihættum og samansettum forritum. Hetta er orsaka av, at leivdirnar við steinrenningum av lumma-hvølpum enn eru so mikið ófullkomnar.

*'Nobody understands the origin of life. If they say they do, they are probably trying to fool you.'*
Ken Nealson



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim**

Á Tórshavnar Ellisheimi búgva 25 búfólk og á Umlættingarheiminum eru 8 umlættingarpláss

Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim er kommunalur stovnur undir trivnaðarfyrisitingini við rakstrarjáttan frá Almannamálaráðnum sambært játtan á fíggjarløgtingslógini.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

### Starvsfólk til Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim

Á Ellis- og umlættingarheiminum eru hesi størv leys at søkja:

Avloysarastarv fyri sjúkrarøktarfrøðing á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum at seta sum skjótast og til 30. september 2005.

Sjúkrarøktarfrøðing í fast starv á starvsbrøki 0,5 í skiftandi vaktum at seta skjótast tilber.

**Vit bjóða**
Eitt avbjóðandi starv innan eldrarøkt. Starvsøkið umfatar arbeiði á Ellisheiminum og á Umlættingarheiminum. Vit eru í gongd við at umleggja arbeiðsgongdina m.a. soleiðis, at sjúkrarøktarfrøðingarnir koma at hava tættari tilknýti til Ellisheimið enn áður. Umframt røktaruppgávur, fer arbeiðið eisini at umfata vegleiðing av starvsfólkum og praktikkvegleiðing av næmingum og møguligum sjúkrarøktarfrøðilesandi.

**Vit sóknast eftir sjúkrarøktarfrøðingum sum**
- hava hug og hegni at arbeiða innan eldrarøkt.
- eru fleksiblir og positivir og hava góð samstarvsevni
- hava hug og hegni at átaka sær vegleiðingsuppgávur

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara á tlf. 317339 ella 311839.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Ellis– og umlættingarheiminum, att. Ida Sørensen, V.U. Hammerhaimbsgøta 7, FO-100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. desember 2004.

Sosialurin
Sosialurin i

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Blóðgevar í Føroyum og onnur áhugað

## Komið og síggið okkara nýggja blóðbanka

Nú blóðbankin er fluttur í nýggj høli á Landssjúkrahúsinum,bjóðar Felagið Blóðgevi øllum Áhugaðum til móttøku. Vit hittast mikukvøldið tann

**1. desember kl. 19.00 í glashøllini á G1.**

(Inngongd er niðan fyri G bygningin við síðuna av kapellinum):

**Skrá:**
Formaðurin bjóðar vælkomin.
Guitarbólkurin hjá Musikkskúlanum spælir.
Kaffi og gløgg verður at fáa.
Blóðgevar og onnur áhugað verða víst runt í nýggja blóðbankanumá G0 í smáum bólkum.
Tey, sum hava áhuga at gerast blóðgevar, kunnu melda seg til.

**Felagið Blóðgevi**

# ALMANNASTOVAN

## Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til upphaldspening fyri seinna hálvár 2004 saman við kvittanum fyri goldnan barnapening, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 3. desember 2004. Um goldið verður til Toll- og Skattstovu Føroya, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Peningurin verður væntandi útgoldin í desember 2004.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til økisdeildirnar. Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barnagjald/-gjøld frá ríkisumboðnum, ella samsvarandi útlendsk gjaldsavgerð sendast inn saman við umsóknini.

**Almannastovan**

Økisdeildin í Tórshavn
J. Broncksgøta 27
100 Tórshavn
tlf. 35 35 10 · fax 35 35 11

Økisdeildin í Norðoyggjum
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
tlf. 45 72 40 · fax 45 72 41

Økisdeildin í Eysturoy
Heiðavegur
620 Runavík
tlf. 47 47 10 · fax 47 47 11

Økisdeildin í Suðuroy
800 Tvøroyri
tlf. 35 35 60 · fax 35 35 61

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

NJÓTIÐ VIKUSKIFTIÐ Á Hotel Hafnia

Restaurant Hafnia
SUNNUDAGSDØGURÐI
HVØNN SUNNUDAG FRÁ KL. 12:00 – 17:00





BÍLEGGIÐ BORÐ á tlf. 31 32 33



3-rættirs matarskrá
» Skansasuppa
við heimabakaðum breyði
» Neytabúffur
við reyðvínssós, borðreiddur við báteaplum og smørstoktum grønmeti
» Hafnia ís-dessert

Høvuðsrættur..... kr. 145,-
2 rættir............... kr. 165,-
3 rættir............... kr. 175,-
Børn 2 – 12 ár ..... 1/2 prís

HOTEL HAFNIA

Hotellið í miðbýnum